# Frágreiðandi tekstur

Her eru fýra stig, sum tú skalt hugsa um, tá ið tú greiðir frá einum teksti.

**Frágreiðandi tekstur**

Ein frágreiðandi tekstur er í fýra stigum:

1. **stig** er yvirskriftin, t.d. *Seinast í 10. øld og fyrst í 11. øld.*
2. **stig** er kunning um, hvat og hvønn teksturin er um, og nær og hvar hann fer fram.
3. **stig** er lýsing av hendingini í **tíðarraði**.
4. **stig** er samanumtøka av tí, ið fór fram, og helst eisini ein viðmerking um fylgjurnar av hendingini.

Eyðkenni við frágreiðandi teksti er, at setningarnir eru bundnir saman við orðum sum: *í byrjanini, í fyrstani, og so, tá, tá ið, síðan, eitt sindur seinni, at enda.*

